VI‹MERKINGAR

Tey eldru í Nor› oyggjum

Ey›gunn Samuelsen,
b‡rá›slimur
www.get.to/eydgunn

Ein kommuna i› ikki tekur hond um sínar eldru íbúgvar er ikki ein kommuna har trivna›urin ver›ur settur í hásæti. Ta› hevur so mangan veri› sagt, at serliga tey eldru i› hava lagt lunnar undir ta› samfelag, i› vit hava í dag, hava uppibori› betur vi›fer›. Ta› er tó ein sannroynd, at júst hesi eldru eru nógv meira nøgdsom og seta færri krøv, enn tey komandi ættarli›ini av eldri fólki. Fyri ta› eiga tey ikki at vera slept upp á fjall.

Í Nor›oyggjum eru umlei› 900 fólk í aldrinum 65-100 ár, av hesum eru 200 yvir 80 ár og ta› eru tey i› vanliga hava tørv á stovnsplássi.

Ta› vil siga, at okkum tørvar umlei› 200 stovnspláss í Nor›oyggjum !!

Í Klaksvík hava vit eini 57 stovnspláss til eldri. Takast skal vi›, at røktarheimi› hevur 36 pláss, er normera til 28 og fær ta› at bera til, vi› at tvey fólk eru á sama kamari. Hetta má sigast at vera sera mannminkandi fyri eitt eldri fólk, at noy›ast at búgva saman vi› ø›rum fólki, og enntá vi› einum i› vi›komandi kanska ikki kennur.

Tá i› n‡ggja samb‡li undir Kráarbrekku kemur vi› 24 plássum, er hetta bert ein hjálp um í minsta lagi ,ver›andi samb‡li, eisini heldur fram.

Eldraøki› er í dag landsmál, men harfrá er onki gott í væntu. Ta› einasta vit hava hoyrt at sitandi samgonga ætlar, er at byggja eitt røktarheim aftrat í nor›streymoy og onki anna› í restina av landinum !!

Tí er rættast at eldraøki› og játtanin ver›ur løgd út til kommununar at umsita. So fáa vit møguleikan, sjálvi at taka hond um okkara eldru, og finna loysnir i› passa til okkara vi›urskifti. Kommununar her nor›i eiga, eisini at samstarva um, at loysa henda trupuleika.

Klaksvíkar kommuna – tey eldru og veiku

Edvin Kjærbo,
valevni hjá Javna›arflokkinum til Klaksvíkar b‡rá›

Eldraøki› er í dag eitt landsmál og ikki kann sigast, at hetta hevur gagna› teimum eldru. Vit hava í dag eina samgongu, i› ni›urpínur alt ta› sosiala øki› og goymir peningin á kistibotninum fyri at fíggja fullveldi. Tey eldru og veiku skulu gjalda fyri fullveldi.

Sami ma›ur i› er fremstur í hesi herfer› móti teim gomlu og veiku í samfelagnum, bjó›ar seg fram til b‡rá›svali› í Klaksvík – enntá sum komandi borgarstjóra.

Klaksvíkar b‡rá› hevur hóast alt roynt at arbeitt til frama fyri teimum eldru. Vi›, saman vi› íbú›argrunninum og ø›rum, at seta skjøtil á bygg-ingina av eldraíbú›um og samb‡li undir Kráarbrekku, má ein siga at kommunan hugsar meir um tey eldru enn sitandi samgonga. Ta› skal b‡rá›i› hava tøkk fyri.

Javna›arflokkurin tekur av heilum huga undir vi› hesum og heldur at eldraøki› ongantí› ov skjótt eigur at leggjast út til kommununar at umsita og ikki minst peningurin eigur at fylgja vi›.

At arbei›a fyri gó›um kor›um hjá teim eldru og veiku hevur altí› veri› a›almál Javna›arflokksins og ta› vil hann eisini gera í Klaksvíkar B‡rá›.

Velji› tí ein sterkan Javna›arflokk inn í Klaksvíkar b‡rá›.

Tryggleikin í fer› sluni

Poul B. Olsen
Valevni Javna›arfloksins til b‡rá›svali› á Tvøroyri

Eitt sum millum anna› liggur mær fremst í huganum nú ta› stundar til b‡rá›svali› á Tvøroyri er, fer›slutrygdin. Me›an fer›slan er økt hesi seinastu árini, eru umstø›urnar hjá fótgangarum einki bøttar. Teir ver›a líti› virdir og mugu gera sær løgir fyri at koma fram nógvasta›ni. Fyri at nevna eitt ítøkiligt dømi, so er einki gjørt fyri at bøta um vegastrekki› millum bedingina og Puntabyrg. Eingin vernd er í ni›ara bor›i og vegurin er alt ov vandamikil, tá i› ein hugsar um at bæ›i tung fer›sla og fótgangarar skulu fer›ast eftir sama smala strekki. Hatta kunnu vit ikki liva vi› í ár 2000 og eigur peningur at ver›a settur av til betran av nevnda vegastrekki. Vit kunnu ikki bara ra›festa mi›b‡in hægst og so venda blinda eyga til, tá ta› sn‡r seg um fer›slutrygdina í restini av b‡num. Eisini mangla gøtuljós nógvasta›ni, her hugsi eg einamest um eitt ávíst vegastrekki í Lí›ini sum liggur í bølamyrkri.

Kommunan setir arbei›i ígongd, men nógv ver›ur ikki gjørt li›ugt! Ta› man uttan iva falla mongum borgarum fyri brósti, at gongubreytin á “N‡ggjavegi” enn ikki er gjørd li›ug. Ta› sum kommunan hevur asvaltera› inni hjá privatfólki hev›i kanska rokki› hálva lei›.

Nei, ta› er lítil kontinuitetur í tí arbei›i sum kommunan hevur sett ígongd og nógv stendur í hálvum gekki. Ein av orsøkunum til hetta, er tann nógv vikna›a tekniska umsitingin. Ein b‡arverkfrø›ingur eigur at ver›a settur aftur í starv, solei›is at kommunan kann hava sítt egna eftilit og fremja uppgávurnar á einum kvalifisera›um grundarlagi. Og fyri at lætta um fíggjarligu byr›ina, so kundi nakrar kommunur kanska samstarva um ein b‡arverkfrø›ing.

Undirsjóvartunnil einasta rætta

Herger› Joensen
b‡rá›slimur og valevni Tjó›veldisfloksins til b‡rá›i›

Ta› er nú einafer› solei›is, at øll sum bjó›a seg fram sum valevni til b‡rá›i›, vilja gera sítt ítasta fyri at halda tey lyftir, sum ver›a givin undir valorrustuni.

Ætlaninar, sum eru fyri Klaksvíkar Kommunu eru stórar, og flestu okkara eru samd um, at ta› einasta rætta er, at undirsjóvartunnil millum Bor›oy og Eysturoy ver›ur gjørdur skjótast tilber, og nú fasta sambandi› til Vágarnar er byrja›, ganga ikki nógv ár, á›renn okkara eisini kemur. Vónandi hepnast arbei›i› í Vestmannasundi væl, tí so ver›ur Nor›oyatunnilin helst framskunda›ur.

Ta› eru nógvir fyrimunir vi› fastum sambandi, her hugsi eg um ungdómin sum gongur í skúla í Kambsdali, og eisini næmingarnir, sum koma a›rasta›ni frá til Tekniska Skúla, Sjómansskúlan, Trygdarmi›stø›ina v.m. í Klaksvík, her kann gerast eitt enn betur samskifti, tá i› koyrandi ver›ur ímillum.

Vit eiga eisini nógv vælútbúgvin fólk, sum onki arbei›i fáa í Klaksvík, men tá fasta sambandi› er veruleiki, kunnu hesi búgva í Klaksvík, sjálvt um tey arbei›a inni á meginøkinum, uttan at ver›a bundin av fer›aætlanum og ringum ve›ri.

Ta› er ney›ugt at fyrireika seg til fasta sambandi› bæ›i hjá borgarum, stovnum, virkjum v.m. Klaksvíkar kommuna og landi› mugu síggja til, at fáa vegakervi› tillaga› at taka ímóti allari fer›sluni, bæ›i til og frá Klaksvík, uttan at fløskuhálsar stinga seg upp. Hetta er naka›, sum eigur at ver›a tiki› upp beinan vegin, skulu vit ikki blíva eftirbátur.

Hendan íløgan í vegakervi› kemur at kosta nógv, tí hev›i veri› rætt, at vit longu nú byrja at seta pening av, so kommunan ikki ver›ur tvungin at skula gjalda hettar í einum, ta› ver›ur ein ov stórur biti, og kemur í ringasta føri at seinka ætlanini.

Velji› lista E!

Breka›ur politikkur!

Tórhallur Áslaksson
valevni Tjó›veldisflokksins

Breka›ur politikkur, er hetta naka› sum áhugi er fyri, ella nyttar naka› at arbei›a vi› málinum?

Eg stilli upp til kommunuvali› í Tórshavnar kommunu, tí eg vil ger›a naka› vi› tann breka›a politikk, i› skal førast tey næstu f‡ra árini, minst.

Fyrst og fremst skulu atkomuvi›urskiftini til byggningar leggjast í fasta legu, tvs. regluger› fyri hvussu atkomuvi›urskifti skulu ver›a, mugu gerast.

Gongubreytirnar skulu ger›ast til tey gangandi, barnavognar og koyristólar, og ikki so bilarnar kunnu koyra lætt tvørturum.

Hesir vælsigna›u »oyggjarvegirnir« kundu ver›i gjørdir solei›is, at eisini súkklubreytir vóru, har er jú massar av spillplássi. Eg kenni í skrivandi løtu ikki grundirnar fyri at ongar súkklubreytir eru í kommununi enn.

Allar skúlagøtur og gøtur í frí›økjum skulu ger›ast solei›is, at ØLL kunnu brúka tær. Bæ›i vi› og uttan hjól, vi› og uttan sjón.

Hevur tú hesi somu ynskir so:

Set tín X vi› eitt av valevnunum á lista E, t.d meg!

Ítróttarpolitikkur

Hallstein Sigur›sson
Valevni Javna›arfloksins

Tá Gundadalur fyri umlei› hundra› árum sí›an bleiv settur av til ítróttar og mentanarøki, vóru fólk framskygd. Sí›ani komu a›rar spekulatiónir. Hús stungu seg upp, vegir gjørdir og øki› til ítrottin minka›i. Og nú er vor›i› alt ov líti›. Ta› si›sta var so eitt misfostur vi› navninum Tórsvøllur, sum bert kan brúkast til nøkur heilt fá, og rættuliga sjáldan. Hetta er dagsins gundadalur.

Fyri at ste›ga fiksum persónum at gjøgnumføra fiksar loysnir, er ney›ugt at man leggur ein langtí›ar ítrottarpolitikk, sum kann tryggja okkum og eftirkomarum ikki at ver›a runnin yvir enda av smartum loysnum.

VI‹MERKINGAR

Hvagar liggur lei›in hjá smærru kommununum og útja› aranum?

Páll á Reynatúgvu
Valevni til bygdarrá›svali› á Sandi



Centralstaturin – »kassami›stø›in« – hevur spælt fallit sum solar plexus í føroyska samfelagnum. Ovurgødda mi›stø›in er vor›in ov tungur bur›ur, og tí skulu vit útja›arafólk sjálvi taka vi› ábyrgdini og gera okkara føroyska framtí›arsamfelag.

Áttatiárini

Kanska sum ein læra ella ávaring, frá ábyrgdarleysa áttatiárapolitikkinum, bera politisku streymarnir í landi okkara í dag brá av, at ávirkan, avger›ir og ábyrgd skulu ganga saman í eina eind, sum hóskandi kundi kallast politiskt trúvir›i og nærdemokrati.

Vit mugu snøgt sagt byggja upp eina politiska skipan, og si›venju, sum borgarin kennir seg tryggan vi›, bæ›i í landspolitikki og í kommunalpolitikki, og uttan mun til um tú b‡r í Mykinesi ella í Skopun.

Centralstaturin spælt fallit

Orsøkin til at vit í dag n‡ta lyklaor› sum álit, greitt ábyrgdarb‡ti, kommunalt sjálvræ›i, er at centralstaturin hevur spælt fallit so ta› forslær. Áliti› á at henda »kassami›stø›in« sum skuldi krevja okkara skattakrónur inn, og sí›ani b‡ta út aftur eftir tørvi er foki›, og ta› langt sí›ani. Tí kassarnir eru ikki komnir útaftur har teir blivu skaptir. Teir blíva verandi á kassami›stø›ini, har teir stø›ugt byggja borg omaná borgir. Kundi lættliga nevnt vi› navni einar 120 “kassar”, men lat ta› liggja á hesum sinni.

Ta› sum skuldi vera trygdin fyri var›veitanini og menningini av smáu bygdasamfeløgunum, og harvi› øllum landinum, er blivi› til eina fyristing og ein fyrisitingarsta›, hvørs høvu›suppgáva er at gø›a seg sjálvan og velta sítt nærumhvørvi. Alt me›an bygdasamfeløgini, sum enn leggja rygg og strev til meginpartin av útflutningi okkara, og harvi› til tann partin av fíggjarliga grundarlagnum hjá »kassami›stø›ini« sum »blokkurin”« ikki tekur sær av, hava sera trupult vi› at bjó›a ungu familjunum og ungdóminum, tann tilverunar lættleika i› »kassami›stø›in« kann bor›rei›a vi›.

Trúgvin uppá at onnur enn tú sjálv, eru betri fyri at fyrisita tínum ríkidømi, hevur víst seg at vera ein lívslygn av formati.

Paralellurin, vi› leiklutin hjá kommunistisku maktelituni mótvegis russiska arbei›sfólkinum er óhugnaliga sjónligur. Somulei›is kann samanberast vi› bureaukratiska EU-veldi›. Hátturin hjá okkara »maktelitu« er kanska ikki so harrendur, men máli› er júst ta› sama. Alt vald á einum sta›i, hjá nøkrum fáum persónum, sum allarhelst ikki eru fólkavaldir.

Ábyrgdin finst ikki a›rasta›ni

Men júst hesin veruleiki vit liva í, setir krøv til okkum útja›arafólk. Setir krøv um at vit trúgva uppá og gjøgnumføra okkara loysnir, í okkara útgávum. Setir krøv um treytaleyst samanhald og samstarv bygdanna millum. Vísir okkum sannleikan um at vit lyfta meira saman, enn hvør sær, og setir krøv um at vit, og bara vit, hava ábyrgdina av okkara parti av landinum. Taka vit vi› ábyrgdini, so kunnu vit eisini krevja okkara rætt.

Størri kommunalt sjálvræ›i, meira ábyrgd til útja›aran og minni av trongskygni og gremjimentan, eru lyklaor›ini i› mynda vegin fyri at kassarnir á »kassami›stø›ini« koma útaftur og gera gagn har teir eru framleiddir.

Men ta› krevur meira enn at bretta upp ermar, uppundir eitt val.

Spælistø› og listaskúli

Jógvan Arge
valevni tjó›veldisfloksins til Tórshavnar B‡rá›

Tórshavnar B‡rá› hevur útvega› sær eitt mentunarálit. Har ver›ur greitt frá, hvussu til stendur. Sta›fest ver›ur, at krøvini ver›a størri, so hvørt sum samfelagi› tekur seg fram.

Ásanna› ver›ur, at krøv eru eisini um pengar. Tey kunna ikki eftirlíkast eftir einum degi, men mælt ver›ur til at gera eina 10 ára ætlan, sum tey einstøku uppskotini ver›a ra›fest í. Hetta er skilagott, og er ein gó›ur máti at fáa gli› á eina skipa›a menning.

Málini eru nógv. Ongin ivast í tí stóra t‡dningi, sum tann kommunali musikkskúlin hevur havt fyri alt mentunarlívi›. Her hava vit eitt átak, sum hevur bori› stóra frukt eftir stuttari tí›. Útvegir mugu gerast fyri, at fleiri sleppa framat møguleikanum.

Útvegir mugu eisini gerast fyri, at tey, sum halda fram innan tónleikin, fáa umstø›ur at virka sum tónleikarar í Føroyum. Eitt er at vera lærari, anna› er at vera tónleikari í so at siga fríari vinnu. Mentunaráliti› sta›festir, at til slíkt virksemi finnast ov fá spælistø›, har almenningurin kann lurta eftir tónleikarunum í hugnaligum umhvørvi.

Skoti› ver›ur upp at gera ni›ara part av Tórsgøtu til eina mentunarmi›stø› eins og Listagili› á Akureyri. Har kann eitt slíkt spælista› t.d. vera í gamla Vaskarínum, i› kundi veri› ein endurfø›ing av sárt sakna›u Perluni. Hví ikki? Maria er loksins givin eftir drúgvt arbei›slív.

Musikkskúlin hevur eydnast væl sum ígongdsetari. Vit hoyra nú um ein sangskúla, sum skal vera vælkomin, og tá er ikki langt til ein brei›an listaskúla. Áhugavert er at fara at hugsa um at skipa ein listaskúla fyri fleiri greinar sum skrivikynstur, málningalist, høggmyndalist, sjónleik o.s.fr.

Ein slíkur skúli ver›ur ikki gjørdur eftir einum degi, men kann takast í hóskandi stigum, og hann skal sjálvsagt eisini hava innivist, men gó›ur møguleiki er fyri samstarvi vi› verandi stovnar sum listaskála, grafiskan verksta›, sjónleikarhús, upptøkuhølir o.fl.

Í Tróndheimi hava tey ein kommunalan musikk- og listaskúla sum ein part av tilbo›num hjá mi›námsskúlunum, og har ríki› rindar sín part. Í mentunarálitinum ver›ur mælt til, at b‡rá›i› setir skjøtil á eina slíka ætlan vi› at játta einum listaskúla grundstykki.

Eitt slíkt stig fer at rinda seg flerfelt aftur í longdini, og er ógvuliga t‡›andi fyri trivna›in í b‡num nú og komandi. Ta› síggja vit einabest av hinum lítla listaskúlanum, sum Ingálvur av Reyni, Janus Kamban, William Heinesen o.fl. høvdu í kjallaranum í Kommunuskúlanum.

Teir løgdu ungdómum lag á í nøkur ár, og fleiri av teimum hugtaka okkum hvønn dag og eru eisini altjó›a vi›urkendir listarmenn, me›an a›rir hugna sær vi› kynstrinum heima í hobbyrúminum.

Skúlamál

Jórun Høgnesen,
valevni Tjó›veldisfloksins til b‡rá›svali› í Klaksvík

Upp undir hvørt einasta val eru skúlavi›urskiftini í Klaksvík sera aktuel, solei›is at skilja at nú vænta vit, at hesufer› ver›ur okkurt munagott gjørt, solei›is at næsta b‡rá›sval fer at snúgva seg um okkurt anna›, men gakk enn eru vit langt frá málinum.

Hvat er so máli›?

Jú, fyrst og fremst hølir og útbúna›ur til skúlarnar, og er hetta ein kommunal uppgáva at loysa. Hinar uppgávurnar hoyra undir a›rar myndugleikar, og skulu tí ikki vi›gerast her.

Einafer› fyrst í 60’unum vóru hølisvi›urskiftini hjá skúlanum nøktandi, men sí›ani tá hava fólkaskúlarnir í Klaksvík altí› veri› noyddir at liva vi› fyribilsloysnum, og ta› er spell, tí tá fer nógv orka til spillis. T.d. kunnu vit nevna at skúlin í sínari tí› hevur leiga› seg inn í KFUM & K, Tekniska Skúla, Sjóklædnarvirki› og skótahúsi›.

Nú er so naka› munagott gjørt vi› Skúlan á Ziskatrø›, og ta› er gle›iligt, hetta arbei›i heldur sjálvsagt fram til li›ugt er.

Til eftirtektar

Ta› er ótrúliga harmiligt at skúlarnir hava fingi› fri› til at forfalla so nógv, tí øll vita, at í 80’unum vóru íløgur gjørdar til alt anna› enn skúlarnar, og tí er skili› sum ta› er. Ta› sigur seg sjálvt at aftaná kreppuna er hesin postur vor›in so tungur fíggjarliga, at torført er at lúka krøvini, nú tey eru vor›in so stór. Ta› er altí› lætt at hyggja í bakspegli› og kritisera, men ta› hevur eisini avgjørdan t‡dning at taka stø›una til eftirtektar, nú útlitini hjá kommununi tykjast at vera betri fíggjarliga. Klaksvíkar kommuna má ongantí› aftur renna seg so fasta í skúlamálum, men leggja stóra orku í at loysa hølistrupulleikarnar vi› framtí›ini fyri eyga.

Skúlin vi› Ósánna

Tann n‡ggja skúlalógin setur ø›rvísi krøv til undirvísing, og so sanniliga eisini nógv størri krøv til hølisvi›urskiftini. Skúlin vi› Ósánna er einki undantak í so máta. Starvsfólkini har hava eisini ofta gjørt vart vi› stø›una. Nógvar loysnir hava veri› frammi, og satt at siga hava lærararnir trú› uppá tær, og vi›gjørt tær í álvara hvørja fer›, uttan at nøkur endalig loysn er sta›fest hjá kommunalu myndugleikunum, tí onkursvegna stø›gar máli› altí› í b‡rá›num. Tó skal sigast, at nú liggur aftur ein loysn á bor›inum um útbygging, og pengar eru settir til projektering. Skulu vit trúgva uppá at naka› spyrst burtur úr nú?

Eg vil í hvussu er gera mítt ítarsta fyri at naka› gott kemur burtur úr, solei›is at næmingar og starvsfólk skúlans fáa tey kor, tey hava krav uppá.

Vi›merkjast má at Ósáskúlin hevur 16 flokkar og 13 skúlastovur, eg endurtaki 16 flokkar og 13 skúlastovur. Hetta talar fyri seg. Hvønn gongur ta› út yvir? Jú, sjálvandi næmingarnar. T.d. hava 1. og 2. flokkur somu stovu, og er ta› als ikki nøktandi í nútí›arsamfelagnum, sum vit jú eru ein partur av.

Skúlagar›urin er eisini ein kapitul fyri seg, hann kundi veri› nógv áhugaverdari fyri næmingarnar.

Eitt anna› gott dømi er fer›slan til og frá skúlaøkinum, ta› vita øll hvussu skili› er klokkan 8 á morgni.

Vit kundu blivi› vi› upp á hendan mátan, øll hava vit jú dreymar, og teir kosta so einki. Men hugaligari er, at síggja dreymarnar gerast til veruleika, og ta› er ta› vit mi›víst skulu arbei›a fram móti.

Tjó›veldisflokkurin vil vera vi› til at seta kós, so nátt ver›ur á mál.

Gott val!